# Vitjar aftur og aftur

**Síðan hann gjørdi filmin um Barbara, hevur filmsleikstjóri Nils Malmros vitjað aftur í Føroyum hvørt ár – minst eina ferð um árið. Tað er okkurt serliga melankolskt við føroysku náttúruni, sigur Nils Malmros**



*Nils Malmros dámar best at hava fólk við sær til Føroya og vera teirra ferðaleiðari, tí upp á tann mátan upplivir hann altíð okkurt nýtt, sær landið við teirra eygum*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## Summargestur



**Randi Jacobsen**
randi@sosialurin.fo

Læknin og sjálvlærdi filmsleikstjórin Nils Malmros misti ikki áhugan fyri Føroyum, tá ið filmur hansara Barbara var liðugur og frumsýndur í 1997.

– Eg havi fasta avtalu við læknafelagið í Keypmannahavn um at fara við sum ferðaleiðari hjá læknum til Føroya annað hvørt ár, sigur Nils Malmros, sum júst hevur verið á vitjan.

Hesa ferð var hann ferðaleiðari hjá átta kvinnum. Kvinnurnar vóru lesibólkurin hjá Marionnu, sum er kona Nils Malmros.

Hann koyrdi runt í landinum og vísti teimum støð, sum hann helt vera verd at vitja, og tey vitjaðu fleiri støð, har upptøkur til filmin Barbara vóru gjørdar. Tey vóru í Mykinesi, men ikki bar til at fara gongutúr í fjøllini, tí summar av kvinnunum vóru høgt uppi í árunum.

Sum altíð sóu tey eitt kvøld filmin Barbara, ið fæst á dvd.

### Vakri Mýlingur

Marianna og Nils Malmros tríggjar dagar longur. Tey ganga altíð nógv fjøllunum í Føroyum, og hvørja ferð eru tey uppi á fjallinum Mýlingi, sum tey eru sera hugtikin av.

Tey fyrstu trý árini eftir, at filmurin Barbara var komin, ferðast hann ofta í Føroyum, og tey trý árini var hann ferðaleiðari í Føroyum hjá umleið 1600 fólkum.

Nils Malmros sigur, at næstan hvørja ferð, hann vitjar, hevur hann fólk við sær og er ferðaleiðari teirra.

– Mær dámar væl at hava onnur við, tí so uppilvi er landið upp á onkran nýggjan máta, tí eg síggi Føroyar gjøgnum teirra eygu, sigur Nils Malmros.

Hann hevur ferðast víða og verið í nógvum londum, men fyri hann er Føroyar nakað heilt serligt.

– Íslendska náttúran er minst líka dramatisk sum tann føroyska, men tað er okkurt melankolskt við føroysku náttúruni. Føroyska náttúran hevu eina heilt serliga sál, sigur Nils Malmros.

### Lætt at ferðast her

Marianna og Nils Malmros halda tað vera lætt hjá útlendskum ferðafólkum at ferðast í Føroyum. Næstan hvagar tey enn fara, ber til at koma aftur um kvøldið til gistingarhúsið, har tey hava innivist. Samferðslan er so góð. Undirsjóartunlarnir hava gjørt tað léttari at ferðast, men sjálvsagt er okkurt mist, nú ikki er neyðugt at sigla, halda tey. Tað er skjótt at koma eftir, hvussu alt virkar, og fólk eru fyrikomandi og løtt at práta við. Eingir trupulleikar eru við at fáa neyðugar upplýsingar um ferðing og annað.

### Aðrir filmar

Síðan filmin Barbara hevur Nils Malmros gjørt tveir aðrar filmar. Í 2002 kom filmurin »At kende sandheden«, sum er um pápa Nils Malmros, ið var heilaskurðlækni og doyði av krabbameini. Nýggjasti filmur hansara eitur kærestesorg og var frumsýndur í vár.

Nils Malmros heldur tað vera løgið, at hvørgin av hesum filmunum enn hevur verið sýndur í Føroyum. Nýggjasti filmurin »Kærestesorg« hevur fingið avbera góða móttøku, og á filmsfestivalinum í Shanghai fekk hann virðisløn fyri at hava besta kvinnuligan sjónleikara. Tað var eitt avrik, tí hann vann í kapping við 270 aðrar filmar.

Nils Malmros veit ikki, um hann fer at gera fleiri filmar. Eingin er á skránni beint nú, men hvør veit?

Næsta summar kemur hann aftur til Føroya sum ferðaleiðari hjá donskum læknum.